## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, um kvøldið lækkar hann niður í sunnan. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og regn. Seinnapartin hvassur vindur av vestri og ælingur. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Hann minkar vindin niður í andøvsgul av vestri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Týsdagin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt, men mikudagin upp í ein strúk av útsynningi og ælingur. Hitin millum 10 og 14 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# "Fólk vita hvat tey skulu keypa"

**33 ára gamli John Norðbú Thomsen hevur stóran áhuga fyri fótbólti. Hann er sannførdur um at Frakland gerst heimsmeistari og Týskland fær bronsuna. Hann arbeiðir annars í Sportsmaster í SMS.**

DAGSINS FØROYINGUR
*Snorri Brend*



*John Norðbú Thomsen væntar at Frakland gerst heimsmeistari*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Keypa føroyingar nógv ítróttarklæði?**
– Tey keypa ikki bara ítróttarklæði, men tey vita eisini akkurát hvat slag av ítróttarklæðum tey skulu keypa. Tey eru sera bevíst um hvørji klæðir og hvørjar skógvar tey skulu hava til rætta endamálið. Eg haldi, at tey hyggja nógv eftir teimum mongu heilsusendingunum í sjónvarpinum. Her fáa tey góð ráð um klæðir og skógvar. Og hetta vilja tey eisini hava.

**Hvat gert tú í frítíðini?**
– Eg venji 2. deild og unglingaliðið hjá B36, og spæli eisini fótbólt sjálvur. Annars brúki eg tíðina saman við unnustu og trimum børnum.

**Hvør gerst heimsmeistari í fótbólti?**
– Tað verður Frakland. Hetta er einasta rætta farvælið, sum Zidane kann geva. Annars vinnur Týskland á Portugal í morgin.

**Fara tit uttanlands í summar?**
– Nei, tað fara vit ikki. Vit fáa vitjan úr Íslandi. Ein systir til unnustuna hjá mær kemur higar 23. juli og steðgar til eftir ólavsøku.

**Hvørjum vilt tú heilsa?**
– Eg vil heilsa unnustuni og børnunum, og allari familjuni.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 28 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 26 |
| Keypmannah. | 26 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 25 |
| Berlin | 27 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 24 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 31 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 25 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 34 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 32 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**gjár:**
Eitt lágtrýst, 998 hPa. við Føroyar fer norðureftir og dýpist nakað. Brúgvalagið við Føroyar fer eystureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið norðan fyri Ísland stendur mestsum í stað. Lágtrýstið vestan fyri Írland kemur hendavegin og gevur væntandi nógvan vind og regn sunnudagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 4/7 kl. 06[00]– 5/7. 06[00]. Hitin í gjár: 11,1°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í apríl: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0 mm – mált frá 4/7 kl. 06[00]– 5/7 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 12 mm


www.sosialurin.fo

Brúðarlín
v/Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

GEV BLÓÐ


## VESTFALLSKYRRINDI

11. juli — Fullmáni
13. juli — Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. Juli | 04.06 | 16.29 | 03.06 | 15.29 | 03.21 | 15.44 | 06.06 | 18.29 | 07.06 | 19.29 | 02.21 | 14.44 | 01.21 | 13.44 | 04.21 | 16.44 | 05.21 | 17.44 | 03.51 | 16.14 | 05.06 | 17.29 |
| 8. Juli | 04.52 | 17.19 | 03.52 | 16.19 | 04.07 | 16.34 | 06.52 | 19.19 | 07.52 | 20.19 | 03.07 | 15.34 | 02.07 | 14.34 | 05.07 | 17.34 | 06.07 | 18.34 | 04.37 | 17.04 | 05.52 | 18.19 |
| 9. Juli | 05.46 | 18.13 | 04.46 | 17.13 | 05.01 | 17.28 | 07.46 | 20.13 | 08.46 | 21.13 | 04.01 | 16.28 | 03.01 | 15.28 | 06.01 | 18.28 | 07.01 | 19.28 | 05.31 | 17.58 | 06.46 | 19.13 |
| 10. Juli | 06.37 | 19.05 | 05.37 | 18.05 | 05.52 | 18.20 | 08.37 | 21.05 | 09.37 | 22.05 | 04.52 | 17.20 | 03.52 | 16.20 | 06.52 | 19.20 | 07.52 | 20.20 | 06.22 | 18.50 | 07.37 | 20.05 |
| 11. Juli | 07.33 | 20.00 | 06.33 | 19.00 | 06.48 | 19.15 | 09.33 | 22.00 | 10.33 | 23.00 | 05.48 | 18.15 | 04.48 | 17.15 | 07.48 | 20.15 | 08.48 | 21.15 | 07.18 | 19.45 | 08.33 | 21.00 |

5 707265 100067 >